# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eisini USA noyðist stundum at tosa við lond og stýri, sum okkum ikki hóvar*

*(James Baker).*

# Mamman myrdi øll fimm børnini

**Á dyrnar hevði hon hongt ein pappírslepa við orðunum »Ring til løgregluna«**

BELGIA

Sorgarleikurin varð avdúkaður seinnapartin í gjár, tá fýra gentur og ein drongur vórðu funnin deyð í einum húsum í belgiska býnum Nivelle. Børnini vóru í aldrinum trý til 14 ár.

Mamman, sum er 51 ára gomul, royndi sambært løgregluni at beina fyri sær, eftir at hon hewvði beint fyri børnunum, men tá tað miseydnaðist, ringdi hon til alarmsentralin. Nú liggur hon á einum sjúkrahúsi. Læknarnir har søgdu í gjárkvøldið, at kvinnan hevur liðið av tunglyndi.

Alt bendir á, at mamman myrdi børnini við knívi, og summar keldur siga, at hon gav teimum okkurt doyvandi fyrst. Pápin var ikki heima, tá sorgarleikurin fór fram, og hann visti tí einki, tá løgreglan boðaði honum frá tí, sum hent var, skrivar AP.

Tað er ikki greitt, hví tann 51 ára gamla kvinnan beindi fýri sínum børnum, men belgiskir fjølmiðlar skriva í dag, at kvinnan hevði fyrireikað seg, og at hon hevði skrivað einari vinkonu bræv, har hon greiddi frá, hvat hon ætlaði sær at gera. Brævið lá við hurðina hjá vinkonuni, men hon sá tað ikki fyrr enn í gjárkvøldið, og tá var ov seint.

Tá løgreglan kom til húsini, har børnini vórðu funnin deyð, hekk ein pappírslepi við orðunum »Ring til løgregluna« á úthurðini. Borgarstjórin í Neville, Pierre Huart, sigur við AP, at tað kom fullkomiliga óvart á grannarnar, at kvinnan skuldi finna uppá at myrða síni egnu børn.

– Tað var eitt púra vanligt heim, sigur borgarstjórin.



*Í morgun stóð løgreglan framvegis á varðhaldi uttan fyri húsunum, har sorgarleikurin fór fram í gjár*

# USA sinnað at tosa við fíggindarnar

**USA er nú til reiðar at tingast við Iran og Sýrialand fyri at fáa hjálp til at steðga ófriðinum í Irak**

George W. Bush, forseti, hevur fyrr sýtt fyri at biðja Iran og Sýrialand um hjálp til at steðga ófriðinum í Irak. Tvørturímóti hevur USA lagt tey bæði grannalondini undir at hjálpa uppreistrarmonnunum í Irak.

Men nú hevur pípan brádliga fingið annað ljóð. Fyrradagin kunngjørdi Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri, at Iran og Sýrialand eru boðin á fund við londini í ST-tryugdarráðnum seinni í hesum mánaðinum at tingast um, hvussu friður kann fáast í Irak.

– Hetta er einki minni enn ein stór broyting í amerikanska politikkinum, og eg vænti, at nakað gott kann spyrjast burturúr, sigur David Serwer á amerikanska friðargranskingarstovninum.

Iranska stjórnin hevur longu svarað, at hon er til reiðar at senda umboð á fundin.

– Vit taka av, so vit kunnu medvirka til at loysa trupulleikarnar hjá irakska fólkinum, segði trygdarpolitiski ráðgevin hjá iranska stjórnini, Ali Larijani, í gjár.

## Heldur diplomati

Í USA hevur avgerðin um fund við Iran og Sýrialand fingið góða móttøku. Demokratiski leiðarin í Senatinum, Harry Reid, sigur, at avgerðin vísir, at tað ber ikki til at vinna kríggið í Irak við hermegi, men heldur við diplomatii. Eisini fyrrverandi uttanríkisráðharrin James Baker, sum stóð á odda fyri Baker-Hamilton-nevndini, fegnast um tað seinasta stigið.

– Vit noyðast at skilja og at ásanna, at USA stundum noyðist at tosa við lond, sum vit annars ikki vilja hava nakað við at gera, sigur Baker við Reuters.

Høvuðsendamálið við fundinum seinni í mánaðinum verður at fáa enda á ófriðinum og at tryggja, at vápnaflutningurin til teir stríðandi partarnar verður steðgaður.

## STUTT SAGT

### Hjálpir sær ikki

Fyrrverandi týski Rote Armee Fraktion-yvirgangsmaðurin Christian Klar hevur biðið um at sleppa úr fongslinum eftir at hava sitið har í 25 ár, men tað er synd at siga, at hann roynir at ávirka týsku politikkararnar til at hjálpa sær við umsóknini. Nú um dagarnar sendi hann einari ráðstevnu hjá ungum týskum kommunistum eina fráboðan, har hann eggjar teimum til at herða stríðið ímóti kapitalsismuni, sum eftir hansara tykki hevur ræði í Týsklandi í dag. Í fráboðanini skrivar Christian Klar, at stundin er komin tilæ at gera enda á teirri kapitalistisku og imperialistisku samgonguni í Evropa, sum roynir at leggja heimin undir seg. Týskir politikarar eru alt annað enn fegnir um orðalagið hjá fanganum, og fleiri siga, at hann eigur at sita í fongsli til sín deyðadag, soleiðis sum dómur hansara eisini sigur.

### Heglaði í Canberra

Hóast tað er summar hesa ársins tíð í avstralska høvuðsstaðnum Canberra, líktist býurin mest einum norðurevropeiskum ella norðuramerikonskum búi í gjár. Alt í einum kom eitt grovt heglingsæl inn yvir býin, og eftir einari løtu lógu allar gøturnar undir í stórum heglingi. Veðurmenninir siga, at heglingurin stavaði frá illveðri við avstralsku eysturstrondina. Í Sidney fingu tey eisini sviðan av illveðrinum. Har var tað kortini ikki kavi, sum ørkymlaði fólk, men torusláttur og grimdarregn.

### Nógv heimleys

Nýggj tøl frá amerikonsku myndugleikunum vísa, at 754.000 amerikanarar eru heimleysir. Tølini vísa eisini, at 59 prosent av teimum heimleysu eru úr ymsum etniskum minnilutum, og at 16 prosent eru kvinnur. Harafturat vísa tølini, at 20 prosent av teimum vaksnu, heimleysu monnunum eru fyrrverandi hermenn. Felagsskapurin hjá teimum heimleysu í USA ivast í tølunum og vil vera við, at talið á heimleysum er nógv størri enn 754.000. Felagsskapurin heldur, at tað rætta talið er millum eina og tvær milliónir.